Broyting í almennu viðskiftatreytunum

- galdandi frá 1. apríl 2004

Føroya Tele ger vart við, at § 9 í almennu viðskiftatreytunum hjá Føroya Tele verður broytt frá 1. apríl 2004, soleiðis at hendan orðing verður sett inn í § 9:

"Tá hald hjá kunda fleiri ferðir áður hava verið stongd ella slitin vegna munandi mishald, kann Føroya Tele tó, tá kundin aftur munandi misheldur sínar skyldur, steingja eitt ella fleiri hald hjá kundanum uttan ávaring."

Almennu viðskiftatreytirnar kunnu síggjast í telefonbókini hjá Føroya Tele, umframt at almennu viðskiftatreytirnar kunnu lesast á www.tele.fo

Faldari við almennu viðskiftatreytunum fæst í telebúðunum kring landið.

petur & petur • 320870

FØROYA TELE

Skapið framtíðina saman við okkum

Sanna syngur løg hjá abbanum

Út er komin fløga, har Sanna Waagstein í Brekkunum syngur løg hjá abbanum, mæta tónaskaldinum Jógvan Waagstein

FLØGUÚTGÁVA

Eirikur Lindenskov

eirikur@sosialurin.fo



Sanna Waagstein í Brekkunum syngur løg hjá abbanum, mæta tónskaldi okkara, Jógvani Waagstein

»Signaða sól« nevnist fløgan við løgunum hjá Jógvani Waagstein. Tað er forlagið Landing Duck Records, ið hevur givið út fløguna við teimum 23 løgunum, sum Sanna Waagstein í Brekkunum syngur.

– Vit hava ein stóran sangskatt í Føroyum og føroyingar eru kendir fyri at kenna og syngja við á nógvar av teikum kendu sangunum. Hesir sangir, sum eisini festa í okkara minni, tá ið teir ljóma á konsertum, í útvarpi, í veitslulag ella í kirkju, skrivar forlagið í tíðindaskrivi.

Jógvan Waagstein er ein av okkara kendastu lagasmiðum. Hann var føddur í 1878 og doyði í 1944. Hann eigur løgini til nógvar av okkara kendastu og mest elskaðu sangum. Sangir, sum »Nú hitar sólin bjarta«, »Í búri«, »Vár við lýggjum vindi« eru sangir, sum vit øll kenna.

Eisini eru sálmaløg sum »Tíðin rennur sum streymur í á« og »Lov og tøkk og allan heiður« komin undan penni Jógvan Waagstein.

Síðani seinast í sekstiárunum hevur Sanna Waagstein í Brekkunum verið ein av okkara fremstu sangarum.

– Mangar eru konsertirnar og upptøkurnar av Havnarkórinum, har klára sopranrøddin hjá Sannu hevur ljómað, bæði sum kórsangari og sum solistur, sigur forlagið.

Øll løgini á fløguni eru upprunaløg hjá Jógvani Waagstein, og eru tey fjølbroytt tilrættaløgd til hesa útgávur.

Martin Restorff Jacobsen spælir klaver

Meinhard Bjartalíð spælir urgu

Ólavur Jakobsen spælir gittar

Eitt lag verður framført av strúkikvartett.

Kjerulff

MOLARHQ J BPPB

Pvdbmibgb^oqfhibo # Eg Í imb j faibo

C l amibgb^oqfhibo



F O^af l bkp H l k`boqp^i , K l oabkp E r p

Qfopa^d abk /+ j ^oqp / - - 1 hi+ . - + - - * . 4+ - -

l d

L kpa^d abk 0+ j ^oqp / - - 1 hi+ . - + - - * . 4+ - -

Rapqfiibo l sbopfdq7

± @ l i l mi^pq
± >__l qq J bafpbkpb
± L of l k Af^dk l pqf`^
± P j fqe # Kbmeb t
± >pqo^ Qb`e
± G l ekp l k # G l ekp l k
± Rk l j baf`^i
± Qe l j ^p Eficbk
± Hg Í o ricc C l amibgb >,P
± Hg Í o ricc Eg Í imb j faibo >,P
± Hg Í o ricc Pvdbmibgb >,P

J bppb^hqfsfqbqbo7

Mù j bppbk sfi abo ra l sbo rapqfiibokb s Í ob cÐidbkab fkc l o j ^qf l kp j rifdebabo7

± Mo l ar hqpb j fk^o
± Mo l ar hqfkc l o j ^qf l kbo
± Kvebabo

Sf pbo cob j qfi ^q _vab ^iib co^ p r kaebappbhq l obk sbih l j j bk+
Mofs^qb h r kabo bo l dpù j bdbq sbih l j j bk qfi ^q hfddb c l o_f+

Hg Í o ricc Pvdbmibgb >,P ± Hg Í o ricc C l amibgb >,P ± Hg Í o ricc Eg Í imb j faibo >,P
Êohb_vsbg 3 ± 212 - Lqqbo r m ± qic+ 31 5 / . 2 02 ± C^u 31 5 / . 2 6 -
t t t+hg^bo ricc+` l j ± m l pq = hg^bo ricc+` l j

Útbjóðing

P/f Eimskip í Føroyum útbjóðar hervið vaskingina av skrivstovubygninginum.

Hølini eru í tveimum hæddum, sum hvør er 100 m2 umfram trappuuppgond.

Í niðara hædd er móttøka, skrivstova, fundarhøli, køkur og WC. Hæddin skal vaskast tvær ferðir um vikuna.

Ovara hædd er øll skrivstova. Henda hæddin skal vaskast einaferð um vikuna.

Tilboð skulu vera inni í seinasta lagi tann 15. mars og arbeiðið byrjar 1. apríl 2004. Tilboð skulu sendast til:

Eimskip P/f
Eystara Bryggja
Postboks 100
FO-110 Tórshavn

Merkt: Vasking

Um spurningar eru, vinarliga ringið til:
Thomas Dam figgjarleiðara
Tlf. 347000 ella sendið teldupost:
dam@eimskip.fo

Stephanssons Hús

EIMSKIP

Eigur ikki at henda aftur

- Hetta er ikki nøkur skandala, men endurtekur hendingin seg, noyðast vit at gera okkurt. Vit vænta eina fyribilsfrágreiðing frá framleiðaranum um hendingina rættiliga skjótt, sigur leiðarin á Skipaeftirlitinum, Óli Hans Hammer Olsen

SIGLING

Vilmund Jacobsen

vilmund@sosialurin.fo

Brimil sleipaði bjargingarflakarnar hjá Smyrli á Tvøroyri, her teir liggja í bátahylinum

Mynd: Leivur Nygaard

Fólk undrast yvir, hvussu tað kundi bera til, at Smyril á veg av Tvøroyri til Havnar seinnapartin hósdagin misti annan bjargingarflakan fyri borð. Tað var einki summarveður á hesum túrinum, men heldur ikki nakað illveður at tosa um. Á ein ella annan hátt fór annar bjargingarflakin hjá Smyrli í havið og blástist upp. Eftir at óhappið var hent, helt Smyril leiðina fram til Havnar.

Bjargingarflakin rak fyri vág og vind suðureftir. Djúpvatnstrolarin, Phoenix, sum var staddur sunnanfyri, rakti við flakan, men teimum eydnaðist ikki at gera nakað við hann.

Vaktarskipið, Brimil, fór á leiðina. Teir tóku tveir av flakunum upp og byrjaðu klokkan 22.19 hóskvøldið at sleipa hinar báðar til lands. Brimil var á Tvøroyri við flakunum klokkan 04.14 fríggjamorgunin.

Stórur flaki

Ein tílíkur bjargingarflaki er samansettur av fýra flakum og tey, ið hava sæð ein uppblástan flaka, siga, at hesin minnir mest um eina stóra hoppiborg.

Í neyðstøðu verður ein hurð í kassanum, sum flakin er í, latin upp; gummidúkarnir verða sleptir fyri borð og blæsast upp til fýra samanhangandi flakar. Ferðafólkini sleppa niður í flakan gjøgnum eina slisku, sum gongur av skipinum og niður.

Smyril hevði tveir slíkar flakar umborð, og er hetta eitt IMO-krav til ferðamannasigling um okkara leiðir.

Sosialurin royndi í gjár at fáa fatur á stjóranum á Strandferðsluni, Kristiani Davidsen, men sambært dagsskránni hjá honum, sat hann á fundi til middags.

Vit ætlaðu at spyrja hann, hvussu tað kundi bera til, at Smyril á hesum túrinum misti annan bjargingarflakan.

Hvørki Jóannes í Heimistovu ella Martin Kruse á Fiskiveiðieftirlitinum, sum nú hevur Vaktar-og Bjargingartænastuna undir sær, vistu nakað at siga um, hví Smyril misti flakan.

Umborð á Brimli, sigur skiparin, Jákup Muller, at tá ið teir komu til bjargingarflakan, lógu allir fýra flakarnir saman, soleiðis sum teir eiga at gera.

- Vit hildu ikki, at flakarnir sóu so stórir út, men tá ið vit høvdu hivað teir báðar fyrstu umborð, var dekkið fult. Tí noyddust vit at sleipa hinar báðar til lands. Tá ið vit komu til lands, var lítil luft eftir í tí eina flakanum.

Jákup sigur, at hvør flakin tekur eini 125 fólk, soleiðis at allir fýra tilsamans taka eini 500 fólk.

- Á havinum liggja hesir fýra flakarnir samanbundnir, sum ein stórur fýrakantur tilsamans. Úr skipinum slepst niður í tann eina flakan gjøgnum sliskuna, og síðan verður gingið yvir í hinar tríggjar.

Skiparin á Brimli sigur, at tá ið flakin blæsist upp á sjónum, er tað líkamikið, hvønn veg hann vendir, tí hann kann nevniliga venda báðar vegir.

Ikki fleiri ferðir

Leiðarin á Skipaeftirlitinum, Óli Hans Hammer Olsen, sigur, at teir hava sent fólk umborð á Smyril at kanna málið, samstundis sum fólk, ið umboða verksmiðjuna, eisini eru komin higar.

- Stutt eftir, at Smyril hevði mist flakan, fingu vit fráboðan um hendingina. Hetta er ikki nøkur skandala sum so, men endurtekur slíkt seg, noyðast vit at gera okkurt. Vit vænta eina fyribilsfrágreiðing frá framleiðaranum um hendingina rættiliga skjótt.

Leiðarin veit at siga, at Smyril misti ikki flakan av vánaligum veðri.

- Vit hava fingið at vita, at tá ið skipið legði seg mest, legði tað seg 22 stig, og tað er ikki óvanligt í sigling um Suðuroyarfjørð. So, tað var ikki at sjógvi, at flakin fór í havið, sigur hann.

Bjargingarflakarnir hjá Smyrli eru av slagnum, RFD, og tað eru eisini onnur skip enn Smyril, sum nýta hetta slagið.

- Ein umboðsmaður er í Føroyum fyri hesar flakarnar, sigur Óli Hans.

Hann sigur seg ikki rættiliga vita, hvussu flakin fer fyri borð í neyðstøðu, men heldur, at tað er ein hurð í kassanum, har flakin liggur, sum fer upp.

- Alt málið verður nú kannað, og vit vænta, at greiða skjótt fæst á teimum spurningum, ið eru, sigur leiðarin á Skipaeftirlitinum, Óli Hans Hammer Olsen, at enda.

Hagstova Føroya er sjálvstøðugi hagtalsstovnur landsins. Stovnurin er í trimum deildum - Hagtalsdeild, KT-deild og Útgávudeild, sum samstarva um at veita almenninginum góð og skjót hagtøl um so nógv viðurskifti sum til ber. Á stovninum arbeiða 15 fólk - búskaparfrøðingar, samfelagsfrøðingar, KT-tøkningar og skrivstovufólk.

STARV

STARV Á HAGSTOVUNI

HAGSTOVAN HEVUR TØRV Á FÓLKI TIL FÓLKAHAGTØL, SERLIGA ÍBÚGVAHAGTØL, ARBEIÐSMARKNAÐARHAGTØL OG INNTØKUHAGTØL.

Til at hava hesa uppgávu um hendi, sóknast vit eftir einum væl útbúnum fólki. Verkætlanirnar í hesum sambandi fara fram í tøttum samstarvi við KT tøkningar og tí vera eisini krøv sett um góð samstarvsevni og góð samskiftisevni um dataskipanir.

Besti førleiki er akademisk samfelagsfrøðilig útbúgving, men hevur tú aðra hægri útbúgving og harafturat royndir ella serligan áhuga í samfelagsmálum, kann hetta vera nøktandi førleiki til starvið. Royndir av arbeiði við telduforritum og datagrunnum geva fyrimun.

Starvið verður lønt eftir galdandi sáttmála millum Landsstýrið og avvarðandi fakfelag.

Umsóknirnar skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 1. mars 2004.

Vil tú hava meira at vita um starvið, set teg í samband við Axel Nolsøe, deildarleiðara, ella Hermann Oskarsson, stjóra, á Hagstovu Føroya, telefon 352800.

team85 tel 358000

HAGSTOVA FØROYA

TRAÐARGØTA 39 · POSTRÚM 2068 · FO-165 ARGIR

TLF. +298 35 28 00 · FAX +298 35 28 01 · HAGSTOVA@HAGSTOVA.FO · WWW.HAGSTOVA.FO

HAVNAR BIO
Tlf. 31 19 56
www.bio.fo



Leygardagin 28.02. kl. 20^{30}
Leygardagin 28.02. kl. 23^{00}
Sunnudagin 29.02. kl. 19^{30}
Sunnudagin 29.02. kl. 22^{00}



Leygardagin 28.02. kl. 20^{00}
Sunnudagin 29.02. kl. 20^{00}

Leygardagin 28.02. kl. 22^{30}
Sunnudagin 29.02. kl. 22^{15}



Billettprísur: 45,- kr.
Leygardagin 28.02. kl. 17^{30}
Sunnudagin 29.02. kl. 17^{30}



Billettprísur: 65,- kr.
Leygardagin 28.02. kl. 18^{00}
Sunnudagin 29.02. kl. 18^{00}

Stórt úrval av DVD-filmum til sølu